




*Nýggja matstovan er ógvuliga snotulig, og nógv er gjørt burtur úr bæði innbúgvi og innrættan.
Mynd: Jens Kr. Vang*

# NÝGGJ HUGNALIG MATSTOVA

Herfyri víðkaði bowlinghøllin á Hálsi um virksemi hjá sær. Fýra nýggjar breytir eru komnir, og harafturat er ein snotulig og dygdargóð matstova latin upp í víðkaðu hølunum

**BÝARLÍV**
**Terji Nielsen**
**terji@sosialurin.fo**

Síðani bowlinghøllin á Hálsi lat upp fyri nøkrum árum síðani, er áhugin fyri hesi ítróttargrein vaksin munandi her á landi. Bowlinghøllin byrjaði við seks breytum, men nú eru fýra gjørdar afturat, soleiðis at tær nú eru tíggju í tali. Somuleiðis hava eigararnir latið upp eina snotuliga matstovu í høllini, og tað gevur nógvar nýggjar møguleikar.

**Familjuvinarligt**
Tey, sum ferðast nógv í Danmark, kenna ivaleyst væl donsku matstovuketuna Jensen Bøfhus, og tað er ikki frítt, at nýggja matstovan á Hálsi líkist hesum matstovunum. Eyðkenni fyri hesar matstovur er, at matarlepin fyrst og fremst bjóðar búffar og eitt stórt salatborð, samstundis sum at nógv verður gjørt fyri børnini og harvið familjurnar. Soleiðis er eisini í Hat-trick, sum nýggja matstovan í bowlinghøllini eitur.

Hølini eru spildurnýggj, og nógv er gjørt burturúr at fáa tey so hugnalig sum gjørligt.

Tað sæst eisini týðuligani, at tað hevur verið hugsað um børnini, tá ið matstovan er gjørd. Beint inn frá sjálvari matstovuni er nevnliga gjørt eitt serligt barnarúm. Í hesum rúmi er ein sjónvarpsskíggi, har teknifilmar eru at síggja, og harumframt eru nógv ymisk sløg av lego annað, ið børnini kunnu spæla við, meðan foreldrini hugna sær við einum betri bita. Tað tykist eisini sum um, at eigararnir hava lagt stóran dent á at ljóðbjálva spælirúmið, so at møguligur larmur frá spælandi børnum ikki skal órógva gestirnar í matstovuni.

**Nýggir møguleikar**
Eigararnir av Bowlinghøllini og matstovuni Hat-trick eru ikki í iva um, at nýggja matstovan í bowlinghøllini gevur teimum heilt nýggjar møguleikar. Nú ber til dømis til at bjóða viðskiftafólkunum eina pakkaloysn við bowling og einum betri bita í sambandi við eitt nú føðingardagar, polterabend og líknandi.

Matarlepin hjá Hat-trick er so mikið fjølbroytt, at tað er okkurt til øll, og eigararnir hava eisini lagt stóran dent á, at góðskan skal verða góð. Matstovan er ikki bert opin um kvøldarnar, tí eisini á miðdegi eru serlig døgurðatilboð at fáa. Uttanlands eru matstovur, ið eru uppbygdar á sama hátt sum nýggja matstovan á Hálsi, ógvuliga væl umtóktar, og eigararnir av Hat-trick vóna eisini, at tað sama fer at verða galdandi í Føroyum.

Umframt nýggju matstovuna er eisini ein ítróttarkafé komin í bowlinghøllini. Kaféin hevur fingið navnið Kafé Hat-trick, og har verða ítróttarhendingar vístar á stórskíggja, soleiðis sum vit eisini kenna tað aðrastaðnis frá.



*Enn er ikki verulig gongd komin á ítróttarkaféina, men hølini eru líðug, og pláss er fyri nógvum fólk til eitt nú Champions League dystir á stórskíggja.
Mynd: Jens Kr. Vang*